## Vallyfti mugu bíða

Fyrradagin tók danska stjórnin aftur eitt uppskot, sum hon legði lagt fyri Fólkatingið um at hækka barnastuðulin til børn undir trý ár. Undir valstríðnum herfyri lovaði stjórnin annars at hækka barnastuðulin, men skattamálaráðharrin sigur, at tíðin er ikki tann rætta. Nú siga politikarar hjá samgonguni, at fleiri onnur vallyfti mugu eisini útsetast, tí búskapurin er yvirhitaður. Sostatt lurtar stjórnin eftir teimum, sum hava ávarað hana.



## Fiskaaling skal kannast

Nú skal kannast út í æsir, hvønn týdning fiskaaling kann fáa fyri Ísland. Í tí sambandi hevur Einar K. Guðfinnnsson, fiskimálaráðharri, sett ikki minni enn tvær nevndir at kanna ymisk viðurskifti. Onnur skal kanna toskaaling, og hon skal serliga kanna møguleikarnar fyri at byggja smolt- og yngulstøðir til at ala ymsan matfisk. Hin nevndin skal kanna lívfrøðiligu og fíggjarligu møguleikarnar fyri at ala krækling við serligum atliti til umhvørvið.

# Eidesgaard favorittur



*Ein slakur triðingur av føroysku veljarunum stuðla Jóannesi Eidesgaard sum framhaldandi løgmanni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Føroyski veljari hevur størst álit á sitandi løgmanni at halda fram eftir valið 19. januar. Ein lítil triðingur ynskir hetta, meðan ein lítil fjórðingur peikar á formannin í Tjóðveldi**

VELJARAKANNING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Hóast nógvar ákoyringar seinastu tíðina, so hevur Jóannes Eidesgaard størst álit millum veljararnar at halda fram sum løgmaður eftir løgtingsvalið 19. januar.

Ein veljararkanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin í gjár og fyrradagin, vísir, at formaðurin hjá Javnaðarflokkinum hevur undirtøku hjá 30,7 prosent av veljarunum. Næstur honum kemur formaðurin í Tjóðveldi, Høgni Hoydal, við 22,6 prosentum ella góð átta prosentstig aftanfyri.

Langt aftanfyri og nummar trý á listanum er ikki ein floksformaður, men harafturímóti fyrrverandi floksformaður og løgmaður, Anfinn Kallsberg, úr Fólkaflokkinum. Hann hevur 8,6 prosent av veljarunum aftanfyri seg sum komandi løgmansevni.

Síðani skulu vit heilt niður á 3,4 prosent fyri at finna tann næsta, sum heldur ikki er floksformaður, men harafturímóti landsstýrismaður í fíggjarmálum. Tað er Magni Laksáfoss úr Sambandsflokkinum. Á fimta plássi liggur floksformaðurin hjá honum, Kaj Leo Johannesen, ið fær 3,0 prosent. Beint aftanfyri er Jørgen Niclasen, nýggi formaðurin í Fólkaflokkinum, ið hevur undirtøku millum 2,9 prosent av føroysku veljarunum. Síðani koma Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, og formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, við ávikavist 1,1 og 0,8 prosentum.

Ikki óvæntað er Jóannes Eidesgaard toppskorari sum løgmansevni millum javnaðarveljarar. Her fær hann 68,4 prosent, men sjálvt í Sambandslfokkin fær sitandi løgmaður 47,1 prosent av atkvøðunum og í Fólkaflokkinum 23 prosent. Somuleiðis hevur Høgni Hoydal 68,4 prosent at tjóðveldisveljarunum aftanfyri seg, meðan undirtøkan er rættiliga lítil í hinum flokkunum. Bert millum sjálvstýrisveljarar er hendan undirtøkan omanfyri 10 prosent, har 11,1 prosent av vejlarunum standa aftanfyri Høgna Hoydal.

Fyri floksformennirnar í hinum báðum stóru flokkunum er veljarakanningin valla serliga hugaligur lesnaður. Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum hevur ber 14,1 prosent av floksins veljarum aftanfyri seg, og somuleiðis stuðla bert 16,2 av fólkafloksveljarunum Jørgen Niclasen sum løgmanni.

Her eru veljararnir í Miðflokkinum munandi meiri trúfastir móti teirra floksformanni, tí 29 prosent av teimum peika á Jenis á Rana sum løgmann, meðan bert seks prosent í Sjálvstýrisflokkinum vilja hava Kára P. Højgaard í løgmanssessin.

Nú er tað soleiðis, at veljarin bert hevur óbeinleiðis ávirkan á, hvør verður valdur til løgmann, so hetta verður hangandi í luftini, til løgtingsvalið er farið afturum. Tað verður nevniliga ikki veljarin, men ein nýggj samgonga, ið skal semjast um, hvør verður settur í landsins hægsta embæti í komandi valskeiði.

| % | Jørgen Niclasen | Kaj Leo Johannesen | Jóannes Eidesgaard | Kári P. Højgaard | Høgni Hoydal | Jenis av Rana | Magni Laksáfoss | Anfinn Kallsberg | Veit ikki | Ógreitt | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkafl. | 16 | 0 | 23 | 0 | 5 | 0 | 1 | 32 | 14 | 8 | 100 |
| Sambfl. | 0 | 15 | 47 | 1 | 1 | 0 | 10 | 2 | 15 | 8 | 100 |
| Javnfl. | 2 | 1 | 68 | 2 | 2 | 0 | 1 | 7 | 15 | 1 | 100 |
| Sjálvstfl. | 0 | 6 | 17 | 6 | 11 | 6 | 0 | 6 | 39 | 11 | 100 |
| Tjóðv. | 0 | 0 | 9 | 0 | 68 | 1 | 0 | 3 | 14 | 5 | 100 |
| Miðfl. | 7 | 0 | 21 | 0 | 0 | 29 | 0 | 0 | 36 | 7 | 100 |
| Miðnámsfl. | 0 | 14 | 57 | 0 | 0 | 0 | 14 | 0 | 14 | 0 | 100 |
| Blankt | 0 | 0 | 33 | 0 | 67 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 100 |
| Ikki á val | 0 | 0 | 21 | 0 | 7 | 0 | 7 | 14 | 29 | 21 | 100 |
| Veit ikki | 0 | 0 | 20 | 0 | 5 | 0 | 5 | 5 | 56 | 10 | 100 |
| Ógreitt | 0 | 0 | 14 | 0 | 5 | 0 | 14 | 14 | 19 | 33 | 100 |
| Tils. | 3 | 3 | 31 | 1 | 23 | 1 | 3 | 9 | 20 | 7 | 100 |

*Úrslit av vejlarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, vísir, at Jóannes Eidesgaard er favorittur sum framhaldandi løgmaður. (Tølini eru rundaði til nærmasta prosentstig)*